Teldusníkar hava brotið inn hjá Føroya Tele

Eftir øllum at døma hava teldusníkar brotið inn hjá Føroya Tele. Eftir hvat Sosialurin skilur, so ber til hjá hesum at lesa teldubrøv hjá fólki og sleppa til loyniligar upplýsingar hjá fyritøkuni

TELD
Heri á Rógvi

Modellmynd

Hóast tað við árunum er bøtt um trygdarviðurskiftini innan telduøki, so eydnast tað eftir øllum at døma nøkrum at sleppa innum trygdargarðarnar. Slíkir persónar verða róptir hackers, t.e. teldusníkar á føroyskum. Tílíkir teldusníkar fara ólógliga inn í skipanir hjá øðrum. Mong kend mál eru millum ár og dag komin fram, har tílíkir teldusníkar hava lagt leiðina framvið loyniligum og oftani sera viðkvæmum upplýsingum. Eitt nú eru stovnar sum Pentagon og CIA vorðnir álopnir av tílíkum sníkum. Aloftast hevur tað eydnast myndugleikunum at finna fram til hesar góðu teldusníkar.

Eisini í Føroyum tykist sovorðið virksemi at koma fyri. Sambært upplýsingum, sum Sosialurin hevur fingið hendi á, so er tað vanligt, at ein ella fleiri teldusníkar bæði dag og dagliga leggja leiðina framvið teldukervinum hjá at kalla øllum fyritøkum, ið hava fast internetsamband. Nú er túrurin so komin til Føroya Tele, sum sigst hava fingið vitjan av teldusníkum. Talan er um at hesin ella hesi eisini hava atgongd til loyniligar innanhýsis upplýsingar hjá Føroya Tele, umframt at lesa teldubrøv, ið verða send gjøgnum netið hjá Føroya Tele. Hvørki Føroya Tele ella kundar hjá fyritøkuni hava eftir øllum at døma varnast nakað.

E-mail og upplýsingar

Eftir hvat Sosialurin skilur, so hava ein ella fleiri teldusníkar borið soleiðis í bandi, at hesin ella hesi kunnu lesa teldubrøv, sum verða send yvir netið hjá Føroya Tele. Eftir øllum at døma kunnu ókendu teldusníkarnir hava fingið hendur á upplýsingum, sum Føroya Tele óivað metur sum loyniligar. Eftir hvat Sosialurin skilur, so er talan um upplýsingar, ið greiða frá innara bygnaðinum á netinum hjá Føroya Tele, og harvið geva sníkum møguleikan at gera sær dælt av upplýsingunum.

Teldusníkarnir, sum siga seg hava brotið inn í kervið hjá Føroya Tele, rópa seg .d~jango og move_ah:21. Hvør stendur aftanfyri hesi nøvn er ógreitt, men okkurt kundi bent á, at talan er um persón ella persónar, sum hava eitthvørt tilknýti til Føroyar.

.d~jango og move_ah:21 upplýsa ikki nágreiniligt, hvat endamálið er við koma innum teldukervið hjá Føroya Tele. Higartil bendir einki á, at tað er ætlanin at skaða Føroya Tele.

Eftir hvat Sosialurin skilur, so hevði tað ikki verið torført hjá hesum at gjørt stóran skaða.

Hvussu?

Stóri spurningurin, sum flest øll sita við, er óivað, hvussu ber hetta til? .d~jango og move_ah:21 siga, at eldri útgávur av cisco routarum, t.e. eindin, sum gevur fyritøkum samband við internetið. Eldur routararnir geva teimum møguleikan til at sleppa innum verjugarðarnar hjá Føroya Tele. Framferðarhátturin, sum verður nýttur til at útvega loyniligar upplýsingar, er við at nýta forrit sum eitt nú "arpredirect.c". .Tað hevur ikki eydnast Sosialinum at fáa upplýst, hvørjir loyniligir upplýsingar eru komnir teimum í hendi. Framferðarhátturin er vanliga nakað, sum tílíkir teldusníkar aloftast ikki nágreiniliga vilja siga, tá hetta er at meta sum eitt slag av vørumerki, og oftani er framferðarhátturin egin.

.d~jango og move_ah:21 vísa á myndir sum prógv fyri, at tað hevur eydnast teimum at koma innum trygdargarðarnar hjá almennu føroysku samskiftis fyritøkuni.

Í øllum førum hevur Sosialurin móttikið upplýsingar, sum skulu vísa, at hesin ella hesi hava megnað at brotið seg inn í innanhýsis netið hjá Føroya Tele.

Fjarskiftiseftirlitið

Av Fjarskiftiseftirlitinum verður upplýst, at teir sum so ikki hava eftirliti við teldusníkum. Teirra uppgáva er at at tryggja, at teir ymsu veitararnir veita neyðugu trygdina til brúkaran.

– Vit plaga at skikja ímillum tvey sløg av teldusníkum. Tað er tað slagið, sum verður ropt »predatorar«, og samstundis er tað eisini tað slagið av teldusníkum, verða róptir »trofæ« sníkarar. Hesir seinnu leggja seg eftir at gera vart við seg sjálvar við eitt nú at lýsa við hesum á teimum støðum, har teir hava verið. Predatararnir leggja seg meira eftir at gera skaða enn nakað annað, sigur Sigurð Vang á Fjarskiftiseftirlitinum. Hann leggur afturat, at tað sum oftast eru teir sokallaðu "trofæ" teldusníkarnir, sum gera vart við seg í Føroyum.

Eisini skýtur stjórin á Fjarskiftiseftirlitinum, Jógvan Thomsen upp, at allir loyniligir upplýsingar, sum ikki skulu síggjast av almenninginum, verða goymdir á einari teldu, sum ikki er knýtt í nakað net.

Góð Verkstova

Mikudagin skipaði Ferðaráð Føroya fyri einari sonevndari verkstovu á Hotel Føroyum. Ætlanin við verkstovuni var at ymsu útbjóðararnir og ferðasmiðirnir skuldu fáa møguleikan at samskifta hvørt við annað. Endamálið er eisini, at úrslitið skal vera, at vit koma at siggja betri pakkaferðir í Føroyum.

Á verkstovuni mikudagin luttóku 8 ferðasmiðir og 32 útbjóðarar. Eisini luttók Bornholms Forskningscenter við einari nýggjari rapport um føroyska ferðavinnu.

Eftir hvat Sosialurin skilur, so er vóru øll rættiliga væl nøgd.

Alarin á Lambavík:

Vit skulu ikki ræðast ILA

Hóast alibrúkið hjá sjálvur formanninum í Havbúnaðarfelagnum nú er rakt av ILA, heldur hann kortini ikki, at føroyingar skulu síggja sjúkuna sum eina hóttan móti føroyskari alivinnu

Kanna vit javnan alibrúkini og taka neyðugu fyrilitini, verður ILA-sjúkan ikki ein hóttan móti føroyskari alivinnu. Hetta heldur Hans Jacobsen, sum eigur ILA rakta alibrúkið á Lambavík, og sum eisini er formaður í Havbúnaðarfelagnum

ILA
John Johannessen

Formaðurin í Havbúnaðarfelagnum sær ikki ræðumyndir fyri sær, tá hann hoyrir um ILA-sjúkuna, hóast ILA-virusið nú eisini hevur rakt hansara egna alibrúk á Lambavík.

– Tað er torført at meta um, hvørjar avleiðingar ILA-sjúkan kann fáa fyri føroyska alivinnu. Men eg rokni ikki við, at hon fer at hava ógvusligar búskaparligar avleiðingar við sær. Vit skulu bara ikki vera bangin fyri at kanna øll alibrúk fyri ILA, so vit kunnu taka neyðugu fyrilitini og fyribyrgja ,at sjúkan spreiðir seg, sigur Hans Jacobsen.

Umstøðurnar skapa sjúkur

Hans Jacobsen veit ikki at siga, hvaðani alibrúk hansara á Lambavík hevur fingið ILA-virusið. Men hann hevur tó, eins og Landsdjóralæknin, ein mistanka um, at tað er villur laksur ella annar fiskur, ið ber smittuna til alibrúkini.

– Ofta eru slíkar sjúkur í sjónum, og so skulu bara tær røttu skeivu umstøðurnar til, fyri at sjúkan brýtur út. Alarar hava lagt til merkis, at sjúkur og kanska serliga lýs, sum aftur eru smittuberar, ofta koma, tá nógvur fiskur er nær alibrúkunum. Og nú vit hava fingið staðfest ILA, hevur nógv hýsa verið nær alibrúkinum hjá okkum, greiðir Hans Jacobsen frá.

Og er tað verurliga soleiðis, at villur laksur ella fiskur ber ILA-virusið millum firðirnar, sær Hans Jacobsen størri vanda fyri, at fleir alibrúk verða smittað. Men hann heldur kortini framvegis ikki, at hetta kann gerast nakar beinleiðis bági fyri føroyska alivinnu.

Sjúkan verður bast

– Í øðrum londum, har ILA-sjúkan hevur herjað, hava tey lagt alibrúkini still eina tíð, og so hevur tað heila lagað seg. Hetta sama rokni eg við, fer at verða galdandi hjá okkum, sigur Hans Jacobsen.

Formaðurin í Havbúnaðarfelagnum roknar annars við, at tað ikki fer at ganga long tíð, til vit hava eina vaccinatión móti ILA-sjúkuni.

– Vit hava fyrr havt álvarsamar sjúkur, so sum hitasjúkuna og Furunculosu, ið hava dripið nógvan laks. Men síðani er vaccina funnin, og nú síggja vit einki til hesar sjúkur. Hetta sama vænti eg, fer at verða galdandi fyri ILA-sjúkuna, sigur Hans Jacobsen, formaður í Havbúnaðarfelagnum og ILA raktur alari.

ILA staðfest á Lambavík

ILA virus er staðfest í alibrúki á Lambavík, men enn er eingin laksur vorðin sjúkur. Økið verður nú avbyrgt. Landsdjóralæknin er bangin fyri, at villur laksur spreiðir smittuna í Føroyum

ILA
John Johannessen

Landsdjóralæknin hevur júst staðfest ILA á fjóðra sinnið í Føroyum. Nú er tað laksur á Lambavík, ið er raktur av álvarsama virusinum.

Bjørn Harlov, landsdjóralækni, sigur, at royndir hava staðfest, at ILA-virusið finst í alibrúkinum á Lambavík. Men tó eingi sjúkueyðkenni verið at sæð enn, eins og heldur eingin deyðiligheit er staðfest.

Kortini vera øll tiltøk sett í verk, fyri at virusið ikki skal spreiða seg. Lambavík og alibrúkið har verða avbyrgd. Men Landsdjóralæknin fer kortini ikki at krevja, at fiskurin verður tikin.

– Fiskurin sleppur at ganga, so leingi eingi sjúkueyðkenni eru. Eg fari ikki at krevja, at hann verður tikin, eins og laksurin í Fuglafirði, Funningsfirði og Oyndarfirði. Smittuvandin er nevniliga ikki so stórur, tá eingi sjúkueyðkenni eru, sigur Bjørn Harlov.

Landsdjóralæknin sigur seg ikki vita, hvussu laksurin á Lambavík hevur fingið ILA-virusið. Tí alibrúkið á Lambavík hevur einki samband havt við tey fýra økini, har ILA áður er staðfest.

Tó sigur Landsdjóralæknin seg vera »meget bekymret« fyri, at villur laksur er smittaður við ILA, og at tað er hann, sum ber smittuna víðari. Er hetta veruleiki, heldur landsdjóralæknin støðuna vera álvarsama fyri føroyska alivinnu.

– Tí so kunnu vit bara bíða eftir, hvar smittan rakar næstuferð, sigur Bjørn Harlov.

TILBOÐ
T-BIRD 1000
&
LITPRINTARI

- ein góð skúlabyrjan!

Telda T-BIRD 1000:
Thunderbird 1000MHz
128MB RAM
30GB Harðdisk
Geforce 2mx 32MB RAM
17" litskerm
40x CD-ROM/10x DVD
56K Modem
Ljóðkort og hátalarasett
Knappaborð
Mús og músamátta

Litprintari:
Canon BJC-2100
upp til 5 síður/minuttin
USB og parallel interface

Forrit:
Windows ME
Word 2001
Works 2001
AutoRoute 2001
PrintMaster Gold
Encarta World Atlas 2001
National Geografic Photo Gallery

Telda, forrit & litprintari einans
12.990,-

SrF Teldu Tænastan
Staravegur 5 - Telefon: 317620 - Heimasíða: www.tt.fo